# Kontroversiellar avgerðir um ES

**Ráðstevna um ES var í Norðurlandahúsinum fríggjadagin. Jóannes Eidesgaard, løgmaður, sigur, at tað er neyðugt fyri føroyingar at taka stórar og kontroversiellar avgerðir í ES-spurninginum. Løgmaður sigur, at realpolitiskt fer okkurt kanska at henda í hesum valskeiðnum**

ES OG FØROYAR

*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

Tað var Løgmansskrivstovan, sum skipaði fyri ráðstevnuni um ES. Løgtingsmenn úr øllum flokkum vóru til staðar, tá serfrøðingar og fólk við vitan um ES høvdu framløgur um Evropeiska Samveldið.

- Løgtingið og Føroya Landsstýrið eru samd um, at tað er týdningarmikið at fáa eitt kvalifiserað grundarlag til vega, soleiðis at mann hevur møguleika fyri at fara inn í eitt veruligt kjak um Føroyar og tilknýtið hjá Føroyum til ES í framtíðini, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður.

## Hangandi fastir

- Vit mugu ásanna, at skulu vit halda fast í eini framhaldandi vælferð í Føroyum, so er tað neyðugt at vit finna okkara pláss í altjóðaøgerðini. Føroyingar hava í nokkso nógv ár havt ein tendens til at verða hangandi fastir í eini skipan, meðan vit síggja øll onnur lond flyta seg og lata seg meira og meira upp. Vit hava kanska havt hug til beint tað øvugta. Tískil er tað so øgiliga neyðugt, at vit dyrka møguleikarnar. Vit mugu finna útav, hvat tað eru fyri modellir, sum eru skilagóð fyri Føroyar, sigur løgmaður.

## Fiskivinnan eymt punkt

- Tá Føroyar í sínari tíð tóku avgerð um, at mann skuldi verða uttanfyri, so var tað orsakað av felags fiskivinnupolitikkinum. Hetta er framvegis eitt eymt punkt, og vit hava hoyrt á ráðstevnuni í dag, at uttan mun til um vit fara inn sum limir gjøgnum Danmark ella sum eitt sjálvstøðugt land, so koma vit undir felags fiskivinnupolitikkin. Tað verður uttan iva øgiliga trupult at fáa nakra serskipan, tá tað snýr seg um fiskivinnuna, men tað eru fleiri aðrir møguleikar fyri samstarvi, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður.

## Møguleikar í frælsunum

- Eg havi ikki nakað einfalt svar uppá, hvat vit eiga at gera, men eg føli tað er ein skylda hjá landsstýrinum at fáa eitt hóskandi vitanargrundarlag til vega, soleiðis at vit kunnu taka kjakið upp í Løgtinginum og finna útav, hvat er ein skilagóð leið, tá vit tosa um ES. Í dag hava vit bert eina avtalu við ES, tá tað snýr seg um vørur, meðan hini trý frælsini eru uttanfyri okkara samstarv. Og tað er í teimum frælsunum, at tað liggur eitt veruligt potentiale fyri eitt lítið land at kunna menna seg, sigur Jóannes Eidesgaard.

## Stórar avgerðir

- Nú tá búskapurin vendir, so síggja vit, at tað er neyðugt at taka nakrar veruligar, stórar og kontroversiellar avgerðir um framtíðina hjá Føroyum. Hetta skal eisini linkast saman við teirri strategisku ætlanini, sum vit hava fram til 2015, har ES-spurningurin er ein týðandi partur. Nógvir íslendingar eru samdir um, at EBS-avtalan var tann hendingin, sum hevði størst ávirkan á at flyta Ísland frá at vera eitt meira ella minni uppsteðgað vakstrarøkið til at verulig gongd kom á búskapin aftur. Føroyingar hava brúk fyri at fáa relatiónir, soleiðis at vit hava møguleika fyri at geva búskapinum eitt spark, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður.

## EBS og EFTA - Hvat er tað?

**EFTA** - European Free Trade Association. Fríhandilsfelagsskapur millum Ísland, Liktinstein, Noreg, og Sveis.

**EBS** er ein samstarvsavtala millum trý av EFTA-londunum einumegin og ES hinumegin. Noreg, Ísland, og Liktinstein hava avtalu við ES, sum ber í sær, at ES-reglur viðvíkjandi innara marknaðinum í ES eisini eru galdandi í hesum londunum. Talan er bert um búskaparligt samstarv, og ikki politiskt samstarv.

Íslendskur sendiharri:

# EBS hevur gagnað Íslandi



*– Íslendskar fyritøkur fingu við EBS ein møguleika fyri at vaksa um og moderniserað seg sjálvar, sigur Kjartan Jóhannsson*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

- Í Íslandi hava vit ásanna, at EBS-samstarvsavtalan hevur verið frugtagóð fyri landið. Hon hevur verið ein av grundarsteinunum undan búskaparligari menning seinastu árini, sigur Kjartan Jóhannsson, íslendskur sendiharri til ES.

- Avtalan hevur eisini havt við sær, at íslendskar fyritøkur hava havt møguleika fyri at víðka um teirra virksemi og harvið fáa eitt betri handilsgrundarlag. Í byrjanini var tað sjálvandi týdningarmikið fyri Ísland, at vit fingu eina góða samstarvsavtalu í samband við handil og fish. Men umframt tað hava vit havt fyrimun av samstarvinum á mongum øðrum økjum. Eitt víðfevnt sjónarmið í Íslandi er, at EBS-samstarvsavtalan hevur gagnað landinum. Men eg havi ikki vitan ella grundarlag fyri at úttala meg um, hvønn veg Føroyar eiga at flyta seg, sigur Kjartan Jóhannsson, íslendskur sendiharri til ES.

**-hkm**

Hoydal:

# Ríkisrættarliga støðan má avklárast

– Fyri tað fyrsta er tað sera trupult at viðgera ES í Føroyum uttan so, at tú hevur avklárað okkara ríkisrættarligu støðu. Men tað ger onki, um vit taka orðaskiftið, tí ES er eisini fyri stórbroyting við teimum eysturevropeisku londunum, sum koma inn. Tað er klárt, at Føroyar mugu finna sær eina støðu, sigur Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldisflokkinum.

- Trupulleikin er bara tann, at yvirhøvur at fara at tosa um eina nýggja skipan við ES, tá vit ikki hava avklára okkara ríkisrættarligu støðu, tað er øgiliga trupult. Sum eitt sjálvstøðugt land høvdu vit saman við Íslandi og Noregi kunna sagt tað, at jamen vit mugu royna at fáa eina skipan við ES, sum er galdandi fyri alt Norðuratlantshavið, ið tekur atlit til, at hesi londini hava bæði søguliga og eisini í framtíðini fara at vilja umsita okkara stóra livandi tilfeingi. Tá hevði mann kunnað staðið sterkur, um mann var eitt slag av norðuratlantiskum OPEC, har vit kundu røkt tey áhugamálini, sigur Høgni Hoydal.

- Men limaskap í ES dugi eg ikki at síggja sum nakran fyrimun fyri Føroyar yvirhøvur, hvørki í núverandi ríkisrættarligu støðu ella sum sjálvstøðugt land. Fara vit í núverandi ríkisrættarligu støðu at tosa um at blíva limir í ES, so verða Føroyar ein dupultur útjaðari; ein útjaðari í Danmark og ein útjaðari í ES við ongari ávirkan, so tað er ikki ein møguleiki, sigur Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldisflokkinum.

**-hkm**

Kalsø:

# Fiskivinnupolitikkurin má greinast

- Føroyar eru eitt sindur øðrvísi fyri enn hini londini við tað, at fiskivinnan hevur so øgiliga nógv at siga. Eg eri av teirri áskoðan, at skulu vit fara inn í ES, so eiga vit at fáa fullkomiliga greiði á, hvørja ávirkan tað fær á okkara fiskivinnupolitikk. Í nógvum av ES-limalondunum, har sum fiskivinnan hóast alt hevur stóran týdning, har eru tey í fiskivinnuni ofta ónøgd við, at teirra ávirkan á fiskivinnupolitikkin ikki er nøktandi. Tað er umráðandi fyri okkum at fáa greiði á hesum. Tættari samstarv er ivaleyst neyðugt. Hesin spurningurin hevur verið frammi í landsstýrinum, og eg trúgvi, at hetta er ein spurningur, sum mann kemur at taka støðu til í nærmastu framtíð - kanska í hesum valskeiðnum, sigur Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiskivinnumálum.

**-hkm**